# Senografi, ljóssetan og sjónleikur

SKEIÐ

MáF hevur fingið tveir av dugnaligastu listarmonnunum innan ljós og senografi í Íslandi, senografin Snorra Freyr Hilmarsson og ljósmannin Árna Jón Baldvinsson, at koma higar at halda skeið leygardagin 4. og sunnudagin 5. september 2004.

Skeiðið er fyri øll, sum gera pallmyndir og seta ljós til sjónleik og onnur listarlig til-tøk, fólk, sum hava hug at at menna seg innan hetta øki og kundu hugsað sær at fingið nýggjar hugmyndir. Skeiðið er bæði fyri tey við royndum og uttan royndir innan hetta øki.

Snorri Freyr Hilmarsson og Árni Jón Baldvinsson eru kendir í Føroyum. Fleiri ferðir hava teir verið her, og hava m.a. staðið fyri pallmynd og ljósi í Leikhúsinum Grímu, í Sjónleikarhúsinum og í Norðurlandahúsinum. Teir hava eisini í fleiri førum arbeitt sam-an við Ega Dam, sum somuleiðis verður lærari á skeiðnum.

Skeiðið verður í Sjónleikarhúsinum í Havn 4. og 5. september 2004.

Meira fæst at vita um skeiðið hjá MáF á 315624 ella á heimasíðuni www.maf.fo



# NØVN Í VIKUNI

## Dalli 80 ár



Týsdagin 24. august fyllir Daniel Jacob Olsen, vanliga nevndur "Dalli" 80 ár. Hóast føddur úti í Kina í Havn, er Dalli ættaður og uppvaksin á Deild í Vestmanna. Hann er sonur Mariu og Óla á Deild.

Sum næstelstur í stórum systkinaflokki kom hann tíðliga at kenna ábyrgd og fór á ungum árum út at arbeiða.

Í nøkur ár sigldi hann við navnframa pápabeiggjanum Lítla Pól - Pól á Smyrli við Smirli. Seinni fór hann til fískarí við m.ø Stellu Argus. Hesi árini fekk hann veruliga hug til sjógvin og valdi at fara til Noregs á maskinmeistaraskúla.

Eftir lokið maskinmeistaraprógv fór Dalli út í verðina at sigla. Við undantaki av onkrum styttri tíðarskeiði við arbeiði á landi, vitjaði Dalli flestu av heimsins londum við norskum skipum, ið sigldu við olju, málmi og stykkjagóðsi.

Miðskeiðis í sjeytiárunum valdi Dalli at sigla í meiri heimligum farvøtnum. Hann sigldi við skipunum hjá Skipafelagnum Føroyar til hann aftur leitaði út í heim og sigldi tá við Copenhagen Reefers. Hetta var serliga sigling millum Danmark og Grønland við skipum sum Eskimo, Ice Port og øðrum. Tann ein túrin við Ice Port mundu teir ikki borðið boð í bý. Staddir miðskeiðis millum Føroyar og Ísland fekk Ice Port ein sjógv. Sjógvurin var ógvusligur. Fleiri rútar á brúnni brotnaðu, skiparastólurin, ið hevði verði boltaður í dúrkið var burtur, og allar maskinur slóknaðu. Tá avtornaði, vunnu teir tíbetur upp land, men henda lagnutúrin mistu teir ein mann.

Tá árini gjørdust sekstisjey legðist Dalli upp á land. Hetta hevði hann tó ikki bindindi til, og fór aftur nakrar túrar við fiskiskipi.

Hóast farin í land hevur Dalli ikki kett seg. Hann er fittur í hondunum, smíðar borðbátar, dámar væl at fara á flot og hevur fingist við ættargransking í nógv ár.

Dalli heldur føðindardagin í heiminum á Suðuroyarvegnum í Havn har hann býr saman við konuni Paulu. Tey eiga trý børn og fimm abbabørn.

Hjartaliga tillukku og góð ynskir!




Vika 35, 2004
www.kaupthing.fo

# Oljan í 50 dollarar fyri tunnuna ?

MARKNAÐARRÁK

Orrustan kring Ali moskuna í Najaf í Irak hevði størstu ávirkan á heimsins fíggjarmarknaðir í farnu viku. Stundum var talan um møguliga vápnahvíld og stundum brustu partarnir saman aftur. Óttin fyri ófriði og at bardagarnir kunnu føra við sær yvirgang, hevur trýst oljuprísin uppeftir. Hóast prísurin náddi 49,4 dollarum fyri tunnuna fríggjadagin, so lækkaði prísurin aftur til umleið 47 dollarar, av tíðindum um, at irakiska løgreglan hevði fingið tamarhald á moskuni í Najaf.

Serliga óttin um oljuveitingina, og í minni mun grundleggjandi árin sum millum annað øktur eftirspurningur, er ein høvuðsorsøk til at oljuprísurin er hækkaður munandi í seinastuni. Hetta er eisini grundgevingin fyri, at oljuprísurin neyvan fer at halda sær á methøga stiginum leingi, hóast prísurin eina rúma tíð enn verður høgur. Mett verður kortini, at óvissan um oljuveitingina fer at føra við sær, at prísurin fer upp um 50 dollarar komandi dagarnar.

Hóast oljan sum væntað, fekk stórt árin á marknaðirnar í farnu viku, gingu marknaðirnir kortini onkran dagin ímóti oljuni, har partabrøv og lánsbrævarentur hækkaðu. Hetta kann metast sum eitt styrkistekin og bendur á, at partabrøvini kunnu standa seg betur komandi tíðina.

Stórur spurningur verður settur við hvørja ávirkan oljuprísurin fer at fáa á heimbúskapin. Her er vert at leggja afturat, at meðan oljuprísurin er hækkaður, er bensinprísurin í seinastuni lækkaður. Hetta minkar nakað um ávirkanina av orkuprísum á búskapirnar. Kaupthing metur framvegis, at enn nýtist einum ikki at bera ótta fyri, at høgu orkuprísirnir fara at hótta heimsbúskapin.

Tað verður tunnligt við tíðindum hesa vikuna. Høvuðshendingarnar verða fríggjadagin tá A.P. Møller kunngerð roknskap og tá onnur uppgerðin fyri búskaparvøksturin í USA verður kunngjørd. Herumframt heldur Alan Greenspan røðu. Størsta týdning fær vakstrartalið úr USA. Kortini metur Kaupthing, at tað framvegis aftur verður støðan í Irak og hervið oljan, sum fer at seta dám á. Møguleiki er fyri eini góðari láns- og partabrævaviku.

Rentur

| | Renta | +/- %-stig |
|---|---|---|
| Diskonto | 2,00% | 0,00% |
| 2 ára lánsbræv | 2,52% | 0,00% |
| 5 ára lánsbræv | 3,56% | -0,01% |
| 10 ára lánsbræv | 4,22% | 0,00% |

Partabrævavísitøl

| | Kursur | +/- % |
|---|---|---|
| KFX, Danmark | 268,5 | 0,7% |
| OMX, Svøríki | 673,3 | 2,6% |
| Eurostoxx 50, Evropa | 2.662,8 | 2,2% |
| S&P 500, USA | 1.098,4 | 3,2% |

Íløgufeløg

| | Kursur | +/- % |
|---|---|---|
| Lánsbrøv í DKK | 106,02 | 0,1% |
| Evru Lánsbrøv | 167,41 | 0,0% |
| Norrøn Partabrøv | 77,16 | 2,3% |
| Altjóða Vøkstur | 57,28 | 2,3% |

Gjaldoyru

| | Kursur | +/- % |
|---|---|---|
| USD | 606,31 | 0,8% |
| EUR | 743,83 | 0,0% |
| GBP | 1.100,43 | -0,6% |
| NOK | 89,97 | 0,0% |

*Renta og kursir kl. 10 í gjár. Broytingar eru útroknaðar í mun til fyri viku síðan.*



# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## 40 ára starvsdagur



Í summar hevur Helgi Danielsen í Klaksvík verið lærari við Skúlin á Ziskatrøð í 40 ár. Hann er nú byrjaður uppá sítt 41. ár sum lærari.

Helgi, sum er sonur Gerdu og Jóan Símun Danielsen á Vágsheygnum í Klaksvík, er føddur hin 8. februar 1941. Í 1966 giftist hann við Sigurbjørg f. Jacobsen úr Sumba. Tey eiga fýra børn: Jan, sum er giftur við Johild Túgvustein – tey eiga børnini: Gunnleyg, Beinir, Hallbjørg og Jón. Finn, sum er giftur við Selmu f. Frederiksberg – tey eiga børnini Joan, Tormund, Helga og John Sigurd. Leif, sum livir saman við Herthu – tey eiga børnini Óla Hans og Sesiliu. Maigunn, sum er gift við Eyðun Jacobsen og tey eiga børnini Rógva og Biritu.

Eftir at realskúlin var liðugur hevði Helgi ymiskt fyrifallandi arbeiði, t.d. á spinnarínum.

Í 1960 gekk so leiðin til Havnar á læraraskúla, og í 1964 fekk hann prógv sum lærari. Sama ár fór Helgi í starv sum lærari við Skúlan á Ziskatrøð, og hevur verið har uttan steðg líka síðan.

Av verandi lærarum á Ziskatrøð, er Helgi tann ein asti sum uttan steðg hevur verið lærari í 40 ár. Eitt sindur løgið kanska, men Helgi og Asbjørn Lóma klett hava fylgst allan vegin í gjøgnum skúlatíðina. Fóru í fólkaskúlan sam stundis, í realskúlan sam stundis, í læraraskúla saman og fingu prógv sama dag. Eisini byrjaðu báðir sum lærarar við Skúlan á Ziskatrøð í 1964.

Meðan Helgi gekk á læraraskúla, var hann í starvsvenjing í Árnafirði. Tá var ongin tunnil, so gangast mátti upp um fjall. Tað var kanska tá, at hugurin til at ganga á fjøllunum birtist, tí í Klaksvík munnu í dag vera fá, sum ikki hava møtt Helga, saman við Oliver Joensen ella onkrum øðrum, á veg í Skúvadal ella onkra aðra staðni.

Helgi hevur altíð møtt sera væl upp í skúlanum. Heilsan hevur verið góð, og tað eru fleiri ár millum sjúkradagarnar. Tað er neyvan langt við síðuna av at siga at sjúkradagarnir øll hesi fjøruti árini kunnu teljast á fingrunum.

Hann hevur verið lærari hjá børnum og svigarbørnum og nú eisini hjá abbabørnum. Ongantíð hevur hann tikið upp á tungu, at hann er troyttur av skúlanum. Hevur onkuntíð í skemti sagt, at hann ikki kann brúkast til nakað annað.

Louisa og Paul Jacobsen, Vanløse:

## Gullbrúdleyp 29. august 2004



Louisa og Paul Jacobsen giftust í Havnar Kirkju tann 29. august 1954.

11. september sama árið varð Paul innsettur sum prestur í Suðuroyar norðara prestagjaldi, men kom í ein ávísan mun at røkja sunnaru helvt eisini.

Í 1958 fluttu tey inn á Nes í Eysturoy, har Paul tók við sum prestur tann 9. apríl. Óiva minnast fleiri har á leiðini Louisu, ið var sera virkin í bygdaumhvørvinum. Hon skipaði fyri hugnaløtum fyri teimum eldru, var um tey ungu, og tá jólini nærkaðust, so vistu fólk, at »Lusiafest« var í prestagarðinum. Hon undirvísti eisini í Glyvra- og Skála skúla.

Á Nesi var tað at dreingirnir komu. Fyrst Kári í 1962 og so Sjúrður í 1964. Kári býr við familju í Herlev og Sjúrður í Roskilde.

Tey eiga ein ommu- og abbason: Tommy, ið er 16 ára gamal.

Tíverri fyri onkran okkara fluttu tey av landinum. Tann 3. januar 1967 tók Paul við sum prestur í Kirkjuni í Glostrup. Har trivust tey væl og Louisa fekk møguleikan at nýta sína útbúgving. Hon virkaði sum sjúkrasystir í nógv ár.

Tey eru búsitandi í Vanløse, men halda dagin saman við familju niðri á Møn.

Vit ynskja tykkum hjartaliga tillukku.

**abð**

Sólvá Olsen, Esbjerg:

## Málningaframsýning í Gallarí Ribarhús í Fuglafirði

Í dag kl. 19.00 letur Sólvá Olsen, Esbjerg, upp málningaframsýning í Gallarí Ribarhús í Fuglafirði. Sólvá er uppvaksin úti í Mattalá í Havn. Elsta dóttir Herborg og Gunnar Gunnarsson. Hon flutti blaðung til Danmarkar og hevur búleikast har síðani.

Sólvá hevur altíð verið sera kreativ og hevur fingist við ymist handaligt arbeiði, m.a. seyming. Seinastu árini hevur hon tó fingist mest við at mála. Sjálv sigur hon soleiðis:

»Eg máli, tí eg kann ikki lata vera. Eg havi roynt ymist, m.a. havi eg seyma nógvar myndir og havi eisini givið frálæru í myndaseyming og aðrari kreativari seyming. Tá ið eg máli, hugsi eg altíð um Føroyar og myndirnar avspeglað eisini hetta. Eg máli fyri mesta partin hugskygt. Frá 1992 til 1997 fekk eg frálæru hjá hollendska »multikunstnaranum« Baukje Zijlstra.«

Sólvá hevur luttikið á fleiri framsýningum í Danmark, og í løtuni eru nakrar av myndum hennara við á eini framsýning í Musikhuset í Esbjerg. Tá framsýningin letur upp í dag kl. 19.00 verður Sólvá sjálv hjástødd, og hon gleðir seg at síggja familju, vinir, kenningar og onnur í Ribarhúsi. Høgni og Bárður á Lakjuni framføra nøkur løg. Boðið verður kaffi og smákøkur.

Framsýningin verður opin: mánadag-fríggjadag frá kl. 15.00-17.30 og leygardagar frá kl. 11.00-13.00.

Framsýningin verður opin til seinast í september mánaði.



## Magnus Henriksen 50 ár



Hósdagin 19. august fylti Magnus Henriksen í Klaksvík 50 ár. Føðingardagin helt Magnus leygarkvøldið á sjómansheiminum, har 130 gestir vóru og heilsaðu uppá hann.

Magnus er klaksvíkingur og uppkallaður eftir abban, Argja Magnus. Foreldrini eru Jonhild, sum fyri nøkrum árum skrivaði tiltiknu kókibókina Góðaráð, og Jósup Henriksen ella Joffa, sum skósmiðurin á Selheyggi, ið var ættaður úr Sørvági, varð nevndur.

Tá ið klaksvíkingar sum allir aðrir føroyingar fóru at keypa nýggjar skógvar í staðin fyri at lata teir til skósmiðin til umvælingar, gavst Joffa við skósmiðjuni. Hann fór at arbeiða hjá Hugo Gardar, og síðani var hann á løngjaldsstovuni. Jósup Henriksen doyði 10. august í 1993.

Magnus er elstur av fýra systkjum. Hini eru Jóhan, Petra og Anvør. Magnus býr saman við mammuni omanfyri kirkjuna, sum hann eigur fastan sess í, Jóhan býr í Klaksvík, Petra í Hvannasundi og Anvør í Streymnesi. Ein genta, Jóna, varð fødd í 1953, men hon doyði átta dagar gomul.

Síðani Magnus fór úr skúlanum, hevur hann arbeitt á Kósini. Har hevur hann verið í fleiri enn tríati ár. Magnus er vinsælur og trúgvur, hann kemur nógv í Emmaus, og hann er sera íðin KÍ viðhaldsmaður. Eitt nú var hann við til Europa Cup dystin í Molde fyri einum ári síðani.

Magnus er stillførur og vinnandi. Hann er ein býarmynd í Klaksvík, og føðingardagurin var ógvuliga hugnaligur og festligur. Ikki minst var tað hugaligt hjá honum, at eini tólv av floksfeløgunum í barnaskúlanum møttu upp og rættuliga settu dám á.

Anskar Hansen, Klaksvík:

## Nýggjur nevndarlimur í Føroya Handverksmeistarafelag



Á eykaaðalfundi herfyri varð Anskar Hansen úr Klaksvík valdur í nevndina fyri Føroya Handverksmeistarafelag.

Á eykaaðalfundi 13. juli var Anskar Hansen valdur í nevndina fyri FHMF.

Anskar Hansen er málarameistari úr Klaksvík. Hann kom inn í staðin fyri Hilmar Danielsen, sum ikki ynskti at halda fram í nevndini.

Í nevndini eru annars: Magnus Magnussen, formaður, Jón Eliasen, næstformaður, Jón Danielsen, nevndarlimur, Eydna S. Olsen, nevndarlimur, og Óli S. Joensen, nevndarlimur.

## Dagurin

**24. august. Bartalsmessa** ella *bartalsøka*. Til minnis um lærusveinin Bartolomeus. Halgisøgan sigur, at tá ið ápostlarnir skiltust, fór hann eystureftir til Armeniu, Mesopotamiu og Indiu, har hann varð tikin av døgum av uppøstum avgudaprestum.

Í træskurðinum á einum av kirkjubøstólunum sæst hann við kvívi í hendi, ið sipar til, at hann varð flettur livandi.

Navnið merkir *sonur Ptolemeusar*.

24. august 1943 var eitt løgtingsval, sum varð rópt *bartalsmessuvalið*.